# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eingin skal vera í iva um, at samarbeiðið millum meg og Putin fer at menna seg, og at vit fara at halda kósina*

*Dmitrij Medvedev*

# Beirut brennur - aftur

**Hizbollah vil vera við, at libanska stjórnin hevur sent felagsskapinum krígsavbjóðing, og enn eina ferð er vandi fyri borgarakríggi í Libanon**



*Brennandi dekk í gøtunum í Beirut í morgun, meðan skotini dundu víða um býin*

*Mynd: Polfoto*

Hizbollah, sum fær stuðul úr Iran, tók í morgun valdið í stórum pørtum av Beirut, og nógvastaðni vóru bardagar millum menn hjá Hizbollah og sunnimuslimskar bólkar, sum styðja stjórnina. Trygdarkeldur søgdu í morgun, at minst 10 fólk lógu eftirá, og at meiri enn 20 vórðu særd í bardøgum í gjár og í nátt. Útlendsk tíðindafólk søgdu í morgun, at skotríðirnar vaktu minni um borgarakríggið frá 1975 til 1990.

Leiðarin í Hizbollah, Hassan Nasrallah, segði í gjár, at libanska stjórnin hevur sent felagsskapinum krígsavbjóðing, tí stjórnin hevur stongt sjónvarpsstøðina hjá Hizbollah. Stjórnin sigur, at støðin bleiv stongd, tí hon sendi tilfar, sum var fíggindaliga sinnað ímóti stjórnini.

Í morgun hevndi Hizbollah avgerðina hjá stjórnini við at herja á sjónvarpsstøðina Future News, sum er vinarliga sinnað ímóti Vesturheiminum, og sum samgonguleiðarin, Saad-al-Hariri, sigur. Hann er sonur fyrrverandi forsætisráðharran Rafik Hariri, sum varð myrdur í 2005. Umframt sjónvarpsstøðina herjaðu menn hjá Hizbollah á eitt av teimum stóru bløðunum, sum styðjar stjórnina.

### Kann breiða seg

Saudiarabia, sum verður roknað sum ein tann týdningarmesti stuðulin hjá libansku stjórnini, hevur biðið hini arabisku londini um ein fund um støðuna í Libanon.

Summir eygleiðarar siga, at spenningurin millum sunnumuslimar og shiamuslimar í Libanon kann lættliga breiða seg til onnur arabisk lond so um Egyptaland, sum eisini styðjar libansku stjórnina og er ímóti Hizbollah.

# Jarðarferðin hjá Englu verður send beinleiðis í sjónvarpinum

**10 ára gamla Engla Höglund, sum varð myrd herfyri, fer til gravar í morgin. Svenska sjónvarpið ætlar at senda beinleiðis frá jarðarferðini, men tað hóvar ikki øllum**

Er tað rætt av tí almenna sjónvarpinum at senda beinleiðis frá jarðarferðini hjá einari smágentu, sum bleiv burturflutt og myrd, og hvør er grundgevingin? Tað spyrja nógvir sviar, nú SVT hevur gjørt av at senda beinleiðis, tá Engla Höglund fer til gravar úr kirkjuni í Stjärnsund í morgin. Tann 10 ára gamla gentan bleiv burturflutt og varð seinni funnin myrd. Drápsmaðurin er tikin.

Í dag kom fram, at spurningurin um at senda jarðarferðina í sjónvarpinum hevur elvt til nógv kjak millum starvsfólkið í SVT, og at næstan 90 prosent av teimum eru ímóti avgerðini. Tey halda, at leiðslan hevur misskilt hugtakið "public service", um hon leggur sendingina í morgin í ta skuffuna.

Men leiðslan stendur við sítt, og tí verður jarðarferðin hjá Englu Höglund send beinleiðis í svenska sjónvarpinum í morgin.



*10 ára gamla Engla Höglund var á veg til hús frá fótbóltsvenjing, tá hon bleiv burturflutt og myrd*

*Mynd: Svenska løgreglan*

## STUTT SAGT

### Royna at gloyma brotsverk

Kinesiski forsetin, Hu Jintao, mælir nú kinesiska fólkinum til at gloyma ta harðrendu framferðina hjá japanska herinum, sum hersetti stórar partar av Kina undan og undir seinna heimsbardaga. Hu Jintao hevur verið á almennari vitjan í Japan teir seinastu dagarnar, og har hevur hann lagt stóran dent á, at tey bæði londini eiga at leggja fortíðina afturum og at hyggja frameftir ístaðin fyri.

- Tað er umráðandi, at vit minnast søguna, men tað skal ikki vera so, at vit bera agg til hvør annan, segði kinesiski forsetin í einari røðu í Tokyo í gjár. Eygleiðarar siga, at orðini hjá Hu Jintao eru merkisverd, tí Kina hevur ofta fýlst á, at japanskir politikarar eru ov trekir við at venda sær frá tí, sum japanski herurin gjørdi inni á asiatiska meginlandinum í 1930- og 1940-árunum.



*Kinesiski forsetin, Hu Jintao*

*Mynd: Polfoto*

### Hjálp til húsaeigarar

Í USA hevur Umboðsmannatingið samtykt eina lóg um at stovna ein trygdargrunn fyri lán, sum kreditfeløg hava veitt, og endamálið við lógini er at styrkja tann skinklandi amerikanska húsamarknaðin. Eftir lógaruppskotinum skal trygdargrunnurin hava 300 milliardir dollarar ella einar 1.460 milliardir krónur til taks, og tær skulu so hjálpa húsaeigarunum, sum eru illa kroystir, tí virðið á húsunum er fallið mundandi. Senatið skal nú taka støðu til uppskotið, men George W. Bush, forseti, hevur sagt, at hann er ikki so fegin um tað.